# Mentanin skal seta dagsskránna

**Tað er rættiliga ymiskar royndir, útlendingar hava havt við at samantvinna mentan og vinnulív. Bæði í Hetlandi og Írlandi eru skipanir, sum kundu verið ynskiligar hjá listafólkum í Føroyum. Ræðandi dømi er Skotland, har vinnulívið í alt ov stóran mun stýrir skotsku mentanini**

MENTANARRÁÐSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*

Eitt av nógv umrøddu evnunum á Mentanarráðstevnuni um vikuskiftið var sambandið millum vinnulívið og mentan. Fyrireikararnir høvdu bjóðað fyrilestrarhaldarum úr fleiri londum at greiða frá, hvussu viðurskiftini millum mentan og vinnulív vóru skipað í teirra parti av heiminum. Flestu luttakararnir á stevnuni vóru á einum máli um, at fyrilestrarnir vóru sera áhugaverdir, og at føroyingar kunnu læra nógv av útlendsku royndunum.

### Ymiskar royndir

Umboðið fyri Hetland, Arthur Watt, sum er formaður í hetlendska lista grunninum, greiddi frá, hvussu stóran týdning oljupengarnir høvdu fyri hetlendska mentanarlívið. Hetlendingar áseta eina ávísa upphædd av inntøkunum av oljuvinnuni til hetlendska mentan, og sambært Arthur Watt høvdu oljupengarnar verið til betra munandi um hetlendska mentanarlívið.

Sett verða eingi krøv til einstaka listafólki, og av tí, at tey sleppa at hóreiggja sær sum tey vilja, eru úrslitini nógv betri. Hetlendska skipanin hevur eisini verið uppi at vent í Føroyum. Eitt uppskot hevur verið, at ein litur av av hvørjari oljutunnu skal fara til føroyska mentan.

Í Skotlandi er støðan ræðandi. Michael Russel segði frá, at skotska mentanarlívið hevði sæð nógv betri dagar. Hann tók kenda filmin, Braveheart, sum dømi um eina óveruliga lýsing av skotsku mentanini. Filmurin var hvørki gjørdur av skotum og ei heldur ikki tikin upp í Skotlandi. Filmurin lýsti væl hvussu vinnulívið hevði fingið ov stóra ávirkan á mentanarlívið í Skotlandi, og at skotska mentanin var blivin til ein søluhátt, sum bara tænti vinnulívinum og als ikki mentanini.

Skotar høvdu selt sína sál, tí alt snúði seg um pengar, og mentanin við við at vatna út til nakað óveruligt. Michael Russel ávaraði føroyingar um ikki at enda í somu støðu sum skotar, har vinnulívið hevði fingið alt ov stórt vald.

Fyrilestrarhaldarin úr Írlandi, Patrick J. Murphy, var sera bjartskygdur um gongdina í Írlandi. Tónleikalív, málningalist, bókmentir og sjónleikur blóma sum ongantíð áður. Politisku myndugleikarnir í Írlandi hava gjørt serligar skattaskipanir til listafólk og vinnulív, sum stuðlar írsku mentanini. Listafólkini sleppa undan at gjalda persónsskatt, og fyritøkur, sum keypa list, kunnu draga listina frá í skatti. Henda skipan var veruliga verd at umhugsa hjá føroyingum, tí hon hevði rættiliga positiv árin á írska mentanarlívið, metti Patrick J. Murphy.

### Mugu ikki selja okkum

Á Mentanarráðstevnu vóru føroyingar og útlendingar samdir um, at føroyingar fyri alt í verðini ikki mugu enda í somu støðu sum Skotland. Bæði umboð fyri vinnuna og mentanina vóru samd um, at royndirnar úr Hetlandi og Írlandi avgjørt áttu at verði umrøddar í kjakinum um føroyskan mentanarpolitikk í framtíðini.

Partarnir vóru eisini á einum máli um, at tað skal verða mentanin, sum setur dagsskránna, og avgerð hvussu langt hon vil flyta seg, og ikki vinnulívið.

Føroysk listafólk vístu á, at tað er sera torført at samantvinna mentan og vinnulív. Mentan og list er vanliga nakað, ið ein er noyddur at fara í dýpdina við, meðan virksemi hjá vinnulívinum ikki júst er av tí slagnum.

Hóast tað ikki varð til meir enn prát á ráðstevnuni, so vóru fyrireikarnar og luttakararnir samdir um, at orðaskiftið var sera gevandi og eitt gott ískoytið til, tá framtíðar mentanarpolitikkurin í Føroyum skal orðast.

Serliga var ferðavinnan havd á lofti, og hvussu mentan og ferðavinna kunnu samstarva fyri at fáa fleiri útlendsk ferðafólk til Føroya. Umboð fyri føroysk listafólk vóru heldur skeptisk, tí tey vildu ikki enda sum ein tilfældig vøra hjá útlendingunum at nýta. Tey vóru bangin fyri, at mentanin ikki fór at fáa tað nógva burtur úr, meðan tað heldur fór at verða vinnan sum fekk størri býti við at gera sær dælt av mentanini.

# Grill og kiosk aftur á Eiði



**Fyri stuttum læt upp nýggj kiosk á Eiði, og í kvøld, mikukvøld, letur grillin, sum hoyrir til kioskina eisini upp**

KIOSK
*Ingrid Bjarnastein*

**Eiði:** Nú hava eiðisfólk endiliga fingið kiosk aftur. Seinastu tíðina hevur ongin kiosk verið á Eiði, burtursæð frá Statoil, sum hevur eini lítil høli í bygdini.

Men seinast í maj mánaði lat kioskin á keiini, sum hon verður kallað, upp.

Tað eru teir báðir Hans Ove Johansen og Ove Hentze, sum eiga kioskina.

Hetta er ongin nýggj kiosk. Hon er nevniliga flutt úr Gøtu til Eiðis, tí talan er um gomlu kioskina hjá Halluri í Gøtu. Har er tó alt gjørt í stand, og hon er sum nýggj nú.

Í kvøld, mikukvøld, letur grillin, sum hoyrir til kioskina eisini upp. Har verður allur vanligur grillmatur at fáa.

Ætlanin var, at bæði kioskin og grillin skuldu lata upp í senn, men tá verkfallið var, og ongin vøra var eftir í bygdini, varð gjørt av at lata kioskina upp eitt sindur fyrr enn ætlað.




# Roskilde Festivalurin útseldur

ROSKILDE FESTIVALUR
*Páll Holm Johannesen*

Nú táttar veruliga ímóti sumri, og tónleika festivalarnir í Evropa eru smátt farnir at byrja. Fyri stuttum var føroyski bólkurin, Deja Vú, á Jelling Festivalinum, og seinni í summar skal Prix Føroyar vinnarin, Gestir, spæla á Nibe Festivalinum.

Roskilde Festivalur, er ein annar tónleika festivalur, sum føroyingar fara at vitja í summar. Tað hevur eini afturvendandi táttur seinnu árini, at ein rúgva av føroyingum leitar sær á tónleikafestivalin í Roskilde, sum í ár verður í døgunum 26-29 juni. Fyrireikararnir á Roskilde Festivalinum boða nú frá, at festivalurin í ár er útseldur.

Eini 70.000 atgongumerki eru longu seld, og fyrireikararnir boðaðu týsdagin frá, at fleiri atgongumerki verða ikki seld. Á festivalinum í ár verða um 150 bólkar, og stóru nøvnini verða, Metallica, Iron Maiden, Coldplay, Bjørk, Blur og Massive Attack.

# Vinnulív og mentan verður tikið við

**Arbeiðsbólkurin, sum er settur at gera uppskot til ein føroyskan mentanarpolitikk, fer við vissu at umrøða, hvussu viðurskiftini millum føroyska vinnulívið og mentanina skulu skipast**

ARBEIÐSBÓLKUR
*Páll Holm Johannesen*

Í vár setti landsstýrismaðurin í mentamálum ein arbeiðsbólk at orða eitt uppskot um ein yvirskipaðan føroyskan mentanarpolitikk. Í arbeiðsbólkinum eru sett 14 fólk, sum øll umboða ymiska partar av føroyska mentanarlívinum. Drúgva verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum hevur havt við sær, at bólkurin ikki hevur fingið so nógv burtur úr, sum ynskiligt var. Formaðurin í arbeiðsbólkinum, Rúna Hilduberg, sigur at kjakið um vinnulív og mentan avgjørt verður eitt av evnunum, sum bólkurin ætlar at viðgera. –Í okkara arbeiðsbólki eru umboð fyri vinnulív, og tí liggur tað rættiliga nær at viðgera spurningin um hvussu viðurskiftini millum mentan og vinnulív skulu skipast í framtíðini, sigur Rúna Hilduberg. Hon leggur dent á, at tað er torført at siga nakað ítøkiligt um hvussu tey verða skipað, tí so lítið er fráliðið í arbeiðinum hjá bólkinum

Arbeiðsbólkurin skal verða liðugur við sítt uppskot á jólum, og væntandi verður uppskotið lagt fyri tingið fyrst í nýggja árinum.



Maskinmaður á Sundsverkinum:

# – Vit hava mist øll rættindi



*Kontrolrúmið á Sundsverkinum. Kári Sigurheim, maskinmeistari hjá SEV, vísir, hvussu motorarnir á el-verknum verða sløktir, um sáttmálaviðurskiftini ikki eru fingin í rættlag áðrenn mikudag klokkan 13.30. Nú tingið leggur uppí, verður helst eingin arbeiðssteðgur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Maskinmeistararnir hjá SEV eru sum vera man sera misnøgdir við støðuna, nú Løgtingið leggur uppí sáttmálaviðurskiftini hjá teimum. – Vit hava í veruleikanum ongan verkfalsrætt, og tað burdu vit fingið eitt sindur eyka fyri, sigur Kári Sigurheim, maskinmeistari á Sundsverkinum**

SEV
*Stefan í Skorini*

– Nú skal døgurðin útá. Tá er forbrúkið av streymi størri, og so seta vit ein motor til afturat, sigur Kári Sigurheim, sum arbeiðir sum maskinmaður hjá SEV á verkinum inni á Sundi. Klokkan er umleið ellivu ein týsmorgun, tá Sosialurin fer á vitjan í einum av elverkunum hjá SEV.

Síðani fer hann at manerera við tólini inni í kontrolrúminum. Generator nr. 3 verður settur til, tí nú skal meira "power" út úr verkinum. Útsendi blaðmaðurin hevur ikki skil fyri maskinum, so lítið høpi er í at tosa um maskinaríið.

Tó er øllum greitt, at motorarnir hjá SEV ikki koyra uttan maskinmeistarar, og um sáttmálaviðurskiftini ikki eru fingin í rættlag áðrenn mikudag klokkan 13.30, liggur landið í streymloysi.

Maskinmeistarafelagið hevur nevniliga boðað frá, at teirra limir ikki skulu møta til arbeiðis eftir hetta. Motorarnir verða tá sløktir, tí SEV hevur eisini boðað frá, at motorarnir koyra ikki uttan maskinmeistarar.

### Fara aftur til arbeiðis

– Eg gangi bara út frá, at vit fara til arbeiðis aftur sum vant mikudagin, sigur Kári Sigurheim, eftir at hann hevur sett tann eina motorin frá og gevur sær stundir at práta um spentu støðuna.

Høgni Hoydal, varaløgmaður, hevur nevniliga heitt á Edmund Joensen, løgtingsformann, um at kalla tingið saman, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við arbeiðsmarknaðarmálum, hevur orðað eitt uppskot til samtyktar, sum skal forða fyri einum arbeiðssteðgi.

Misnøgdin millum maskinmeistararnar er sera stór, og teir kenna seg illa viðfarnar av landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Karsten Hansen.

– Samráðingarrætturin er í veruleikanum tikin frá okkum, og vit hava eisini mist verkfalsrættin. Tað burdi givið eitt sindur eyka í løn, sigur Kári Sigurheim.

– Hetta er sum at spæla ein fótbóltsdyst, men tá dysturin er liðugur, sigur dómarin, at dysturin skal spælast umaftur. Vit hava í veruleikanum longu spælt ein umdyst, men nú skal dysturin eftir øllum at døma spælast fyri triðju ferð, sigur Kári Sigurheim, sum hevur arbeitt á verkinum inni á Sundi í sjey ár.

### Boyggja seg fyri tinginum

Kári Sigurheim leggur stóran dent á, at eingin ósemja er millum SEV og Maskinmeistararnar, hóast hetta kann tykjast soleiðis í fjølmiðlunum.

– Vit kenna okkum kriminaliseraðar, tí at vit leggja arbeiðið niður, men hetta er okkara rættur, tá eingin sáttmáli er at halda seg til. Tað er ikki okkara trupulleiki, at SEV ikki hevur havt sítt bakland í lagi, sigur Kári Sigurheim.

Hann vísir samstundis á, at talan er bara um góðar fýrati maskinmeistarar, og tað oyðileggur ongan landsbúskap eftir hansara tykki.

– Tað er nú einaferð soleiðis, at løgtingið er suverent, og øll mugu halda landsins lógir, men vit eru skelkaðir av gongdini í hesum málinum, sigur maskinmeistarin á vakt hendan morgunin. Tveir maskinmeistarar eru til arbeiðis í senn, og teir arbeiða í trýskiftisvaktum.

Kári Sigurheim heldur, at hasin góðkenningarmyndugleikin skuldi verið tikin frá landsstýrismanninum. Tástaðni høvdu maskinmeistararnir havt veruligar sáttmálasamráðingar, heldur hann.

– Nú mugu vit bara taka til takkar við tí, sum landsstýrismaðurin bjóðar okkum, sigur ein misnøgdur maskinmeistari.



*Motorarnir hjá SEV á Sundi koyra við tungolju. Sløkna motorarnir, er tað stríggið at fáa teir í gongd aftur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Misálit á leiðslu í SEV

**Klæmint Olsen, umboðsnevndarlimur í SEV, fer fríggjadagin at mæla til, at hægsti myndugleikin í SEV setir stjóran og stýri fyri SEV frá**

SEV-SPENNINGUR
*Ingi Rasmussen*

Nú má vera vell. Leiðslan í SEV má leggja frá sær.

So bersøgin er Klæmint Olsen, umboðsnevndarlimur í SEV.

Umboðsnevndin, sum er hægsti myndugleiki í SEV, hevur fund fríggjadagin. Og tá fer Klæmint Olsen at mæla til, at umboðsnevndin samtykkir eitt misálit á bæði Klæmint Weihe, stjóra í SEV, og stýrið fyri SEV.

Orsøkin er, sigur hann, at leiðslan í SEV er um at fáa seinna gula kortið, eftir stuttari tíð. Tað fyrra kom, tá stjórin í SEV var ógegnigur í málinum um Vágatunlinum. Ta samtykti umboðsnevndin, at stjórin skuldi ígjøgnum eina tænastuliga hoyrint.

Nú er aftur galið í sambandi við sáttmálarnar, sum SEV hevur gjørt við maskinmeistararnar. Klæmint Olsen vísir á, at stjórin og stýrisformaðurin hava fingið at vita frá landsstýrismanninum, at hann ikki fór at góðkenna sáttmálan, og kortini undirskrivaðu teir hann. Ivasamt er eisini, um stýrið er nóg væl kunnað.

Hetta er enn eitt dømi um, at leiðslan í SEV handfer eitt mál jánkasliga, sigur Klæmint Olsen.

– Eg ivist ikki í, at tað eru hampafólk, ið sita í leiðslu SEV's. Hinvegin ber ikki til hjá umboðsnevndini bara at lata standa til. Vit hava eina ábyrgd mótvegis Føroya fólki. Við hesum fari eg tí at mæla til, at umboðsnevndin á fundinum fríggjadagin samtykkir eitt misálit á stýri og stjóra, sigur Klæmint Olsen.